# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 17.03.2016 kl. 17:30
**Málnr.:** 13/00245

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Erling Petersen, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen.

Varalimir: Jan Gardar møtti fyri Eyðstein Ó. Poulsen

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 17/16 | 15/01217-9 | Býráðslimur burturstaddur (mars 2016) - Eyðstein Ó. Poulsen |
| 18/16 | 16/00332-1 | Lund við Ósánna |
| 19/16 | 15/00185-11 | Nýggj fimleikarahøll |
| 20/16 | 16/00330-1 | Nýggjur arbeiðsbilur til Vegadeildina - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð* |
| 21/16 | 16/00210-4 | Bráðfeingis loysn til fleiri ansingarpláss – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 22/16 | 16/00259-1 | Framflyting av játtanum frá 2015 til 2016 – *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 23/16 | 15/00544-10 | Eykajáttan til Húsið 2015, rakstur 2016 – *seinna viðgerð* |
| 24/16 | 12/01195-4 | Nýggjur húsarhaldsskúli í miðbýnum |

## 17/16
## 15/01217 Býráðslimur burturstaddur - Eyðstein Ó. Poulsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 17.03.2016 | 17/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Eyðstein Ó. Poulsen, býráðslimur, hevur umvegis teldupost boðað borgarstjóranum frá, at hann verður burturstaddur í tíðarskeiðinum 4. – 29. mars og tí ikki fær røkt býráðsarbeiðið hesa tíðina.
Sambært fundarútskrift frá Valnevndini frá 14. nov. 2012 er fyrsti varalimur Fólkafloksins Erling Petersen. Men av tí at Erling Petersen longu hevur sæti í býráðnum, er neyðugt at kalla næsta tiltakslim inn. Næsti á listanum er Jan Gardar, og verður hann tí at møta vegna Eyðstein Ó. Poulsen til býráðsfundin 17. mars 2016.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin (KSL), grein 18, stk. 2:
*Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
KSL, grein 18, stk. 3:
*Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýning til varalimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til lata Jan Gardar taka sæti í býráðnum á fundinum 17. mars 2016.

**Býráðsins samtykt 17-03-2016**
Tilmælið samtykt, og Jan Gardar tók sæti.

## 18/16
## 16/00332 Lund við Ósánna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 07.03.2016 | 21/16 | |
| 2 Mentanarnevndin | 07.03.2016 | 10/16 | |
| 3 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 08.03.2016 | 9/16 | |
| 4 Tekniska Nevnd | 09.03.2016 | 11/16 | |
| 5 Fíggjarnevndin | 15.03.2016 | 19/16 | |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 17.03.2016 | 18/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Umsitingin greiðir í skrivi tann 2. mars 2016 frá, at sum partur av framtíðar miðbýarætlanini er hugsað um at fáa gjørt nakað av fríðkanararbeiði í ovara Vágsbø. Ósbjørn Jacobsen arkitektur, sum hevur framt samtykta skipanaruppskotið, hevur í samráð við TU gjørt eitt neyvari uppskot, sum hervið verður sent viðkomandi nevndum og býráði til umrøðu og støðutakan.

Uppskotið leggur upp til eina gagnnýtslu av ovara Vágsbø, sum uttan iva fer at føra til, at økið kemur borgaranum meira til góðar. Ein partur av uppskotinum er eisini at tryggja skúlanæmingunum trygga farleið til býarbussin, sum kemur og fer frá farstøðini á Sandinum.

Ósáin verður sambært verkætlanini umløgd, og ætlast hetta arbeiðið samskipað við grannan eystanfyri. Avtala er gjørd við Sparikassan, sum fevnir um, at partarnir í felag gera eitt endaligt projekt, sum skal sýna, hvussu Ósáin verður umløgd.

TU mælir til, at byrjað verður upp á verkætlanina nú, og at kr. 250.000,- verða játtaðar í inniverandi ári, so farast kann til verka. Fyrsta stig er at fáa gjørt gøtur, heyggjar og eina brúgv um Ósánna tætt við skúlaøkið.

**Tilmæli:**
Mælt verður nevndum og býráði til at taka undir við málinum, og at peningurin (kr. 250.000,-) verður tikin av *Íløgukontu* hjá *Miðbýur,* har kr. 5.000.000,- eru tøkar, frá einari framflyting av játtan frá 2015 til 2016.

**UBN 07-03-2016:** Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 02-03-2016.

**MeN 07-03-2016:** Nevndin tekur undir við UBN 02.03.16.

**TrN B&U 08-03-2016:** Nevndin tekur undir við málinum og heitir á umsitingina at taka atlit til virksemið á Skúlatrøð.

**TN 09-03-2016:** Nevndin tekur undir við UBN 07-03-2016, MeN 07-03-2016 og TRN B&U 08-03-2016.

**FíN 15-03-2016:** Nevndin tekur undir við TN 9. mars 2016.

**Býráðsins samtykt 17-03-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 17-03-2016.

## 19/16
## 15/00185 Nýggj fimleikarahøll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 07.03.2016 | 19/16 | |
| 2 Mentanarnevndin | 07.03.2016 | 11/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 17.03.2016 | 19/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Á fundi í UBN 15-02-2016 varð samtykt, at haldast skal fram við fyrireikingararbeiðinum av nýggjari fimleikarahøll í Klaksvík. Næsta stigið í fyrireikingini er at orða eina byggiskrá.
Byggiskráin skal lýsa m.a. tørvin á funktiónum og stødd av fimleikarahøllini. Tá nevnda arbeiðið er gjørt, kann projekteringin bjóðast út. Um so er, at projekteringin ikki verður útboðin, so verður mælt til at fara víðari við arbeiðinum at gera eitt skitsu-/skipanaruppskot.
Støða skal eisini takast til spurningin, um fimleikarahøllin skal vera partur av aðrari verkætlan, sum fevnir um at bøta um umklæðingarpartin í KÍ-høllini. Um so verður, so kunnu hesar funktiónir eisini gagnnýtast í samband við fimleikarahøllina. Hetta viðførir eisini, at nýggja fimleikarahøllin verður munandi bíligari.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Mett verður, at ein byggiskrá fer at kosta einar kr. 50-60.000,-. Verður valið, umframt eina byggiskrá, at gera eitt skitsu-/skipanaruppskot, so verður kostnaðurin einar kr. 100-120.000,-. Umrødda fyrireikingararbeiðið verður fíggjað av *Fastognum*.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum um, at fyrireikingararbeiðið heldur áfram, og at umsitingin fær heimild til at gera avtalu við ráðgeva um byggiskrá.

**UBN 07-03-2016:** Ein meiriluti, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Jóhann Lützen og Erling Petersen, tekur undir við tilmælinum og heitir á teknisku umsiting um at fáa tilboð frá tveimum veitarum, har annar er lokalur. Ein minniluti, Gunvá við Keldu, tekur undir við tilmælinum men mælir til, at ein lokalur kemur at gera byggiskránna.

**MeN 07-03-2016:** Ein meiriluti, Signhild V. Johannesena, Óluva Klettskarð, Jóhann Lutsen og Atli S. Justiniussen, tekur undir við meirilutanum í UBN 07.03.16, og Gunvá við Keldu heldur seg til minnulutatan í UBN 07.03.16.

**Býráðsins samtykt 17-03-2016**
Atkvøtt varð um minnilutatilmælini í UBN og MeN. Tey fullu við 1 atkvøðu fyri (GvK), 9 ímóti (JS, SOJ, ÓK, JL, SVJ, KEZ, JG, EP og ASJ) og 1 blankari atkvøðu (HJS).

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælini í UBN og MeN. Einmælt samtykt at taka undir við meirilutunum í UBN og MeN 07-03-2016.

## 20/16
## 16/00330 Nýggjur arbeiðsbilur til Vegadeildina - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 09.03.2016 | 9/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.03.2016 | 18/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð* | 17.03.2016 | 20/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð* | 21.04.2016 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi frá umsitingini hin 2. mars 2016 verður sagt frá, at kommunan hevur miðað ímóti at skifta gamlar kommunalar bilar og maskinur út, og kann staðfestast, at árligi viðlíkahaldskostnaðurin minkar, so hvørt sum nýtt kemur ístaðin fyri gamalt.

Bilurin, sum nú stendur fyri tørni, er arbeiðsbilurin hjá ferðslutoyminum á Vegadeildini. Bilurin er í so vánaligum standi, at kommunala smiðjan mælir frá fleiri umvælingum. Talan er um ein arbeiðsbil, sum er innrættaður sum ein lítil smiðja.

Kommunan hevur fingið eitt óbindandi tilboð upp á ein Nissan kassabil. Mett verður, at nevndi bilur er sera væl egnaður.

Tekur nevndin undir við málinum, mæla vit til eina broyting av fíggjarætlanini fyri 2016.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Málið krevur eina broyting av fíggjarætlanini fyri 2016, tí rakstrarsíðan minkar við kr. 230.000,-, og íløgusíðan veksur tilsvarandi. Málið krevur tvær viðgerðir í býráðnum, og Fíggjarmáláráðið skal kunnast.

**Tilmæli:**
Vísandi til bráðfeingis tørvin, verður mælt nevndum og býráði til at taka undir við málinum.

**TN 09-03-2016:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU 02-03-2016.

**FíN 15-03-2016:** Nevndin tekur undir við TN 9. mars 2016.

**Býráðsins samtykt 17-03-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 15-03-2016.

## 21/16
## 16/00210 Bráðfeingis loysn til fleiri ansingarpláss – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 08.03.2016 | 8/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.03.2016 | 16/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð* | 17.03.2016 | 21/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð* | 21.04.2016 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini frá 1. mars 2016, har greitt verður frá málinum.
Seinnu árini hevur verið sera stórur eftirspurningur eftir plássum í Snjallubjallu við skúlabyrjan. Tørvurin hevur verið større, enn Snjallabjalla rúmar, og tí varð í august 2015 gjørd leiguavtala um tvey rúm í Badmintonhøllini, sum kundu nøkta henda eyka tørv. Gongdin í Snjallubjallu er annars tann, at tá ið vit nærkast várinum (frá nú av og fram til summarið), verða børn útmeldað, og barnatalið lækkar. Sostatt er ikki tørvur á Badmintonhøllini í sama mun hesa tíðina.

Tað øvugta ger seg galdandi á dagstovnunum, tí um heystið og fram til mars/apríl mánað megna vit at nøkta tørvin, meðan vit um várið ofta koma í støðuna, at okkum manglar pláss. Fyri at fáa eyka pláss á dagstovnum hesa tíðina av árinum er upplagt at brúka Badmintonhøllina sum ein ”buffara”.

Henda loysn gevur átta tøk barnagarðspláss í Blákolluni, sum eru kærkomin, um tørvur á plássum vísir seg, tá ið t.d. familjur flyta til Klaksvíkar.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Rakstrarútreiðslur fyri átta barnagarðspláss í 3 mðr. (1. apríl – 30. juni 2016):

| | |
|---|---|
| Lønir | kr. 110.635,- |
| Matur | kr. 3.200,- |
| Dagdvølja | kr. 1.850,- |
| Rakstur tils. | kr. 115.685,- |
| Foreldragjald | kr. (28.776,-) |

**Kommununnar partur kr. 86.909,-**

**Lógargrundarlag:**
*Dagstovnalógin
*Vegleiðing frá Landslæknanum um loyvt barnatal pr. fermetur

Talan er um nýggjar útreiðslur, ið ikki finnast innan skipanina, og sum Blákollan ikki hevur møguleika at fíggja, og tí er neyðugt við eykajáttan, ið somuleiðis krevur tvær býráðssamtyktir.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at tey átta barnagarðsbørnini úr Blákolluni pr. 1. aprí 2016 og fram til summarferiuna fáa eitt avbjóðandi tilboð, sum hevur sítt útgangsstøði í Badmintonhøllini.

**TrN B&U 08-03-2016:** Nevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 01.03.16

**FíN 15-03-2016:** Nevndin tekur undir við TrN B&U 8. mars 2016, og verður peningurin markaður til serstaka verkætlan "ansingartrygd".

**Býráðsins samtykt 17-03-2016**
Málið tikið av skrá og verður at leggja fyri aftur í apríl umfarinum.

## 22/16
## 16/00259 Framflyting av játtanum frá 2015 til 2016 – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.02.2016 | 14/16 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð* | 25.02.2016 | 15/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð, *seinna vigerð* | 17.03.2016 | 22/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 25. feb. 2016.

**FíN 23-02-2016:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 18. feb. 2016.

**Býráðsins samtykt 25-02-2016:** Einmælt samtykt at taka undir við FíN 23-02-2016.

**Býráðsins samtykt 17-03-2016**
Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 23/16
## 15/00544 Eykajáttan til Húsið 2015, rakstur 2016 – *seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 19.01.2016 | 4/16 | |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

| | | | |
|---|---|---|---|
| 2 Fíggjarnevndin | 26.01.2016 | 2/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð* | 25.02.2016 | 7/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð* | 17.03.2016 | 23/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 25. feb. 2016.

**TrN B&U 19-01-2016:** TRN B&U 19.01.16 Nevndin umrøddi málið.

**FíN 26-01-2016:** Nevndin samtykti, at játtanin til Húsið fyri 2016 verður kr. 1.759.000 vísandi til áður umrøddu regulering.

**Býráðsins samtykt 25-02-2016:** Einmælt samtykt at taka undir við FíN 23-02-2016.

**Býráðsins samtykt 17-03-2016**
Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 24/16
## 12/01195 Nýggjur húsarhaldsskúli í miðbýnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.03.2016 | 20/16 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 17.03.2016 | 24/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini frá 11. mars 2016, ið greiðir frá, at Húsarhaldsskúli Føroya hevur seinastu árini arbeitt við at fáa nýggjan skúla til endamálið. Eftirspurningurin eftir tilboðunum á skúlanum er nógv størri, enn verandi karmar loyva. Harumframt eru verandi karmar sera ótíðarhóskandi.

Húsarhaldsskúlin hevur saman við avvarðandi mynduleikum arbeitt miðvíst við einari byggiskrá, ið nú endaliga er liðug og verður eftir ætlan handað landsstýriskvinnuni áðrenn mánaðarskiftið.

Fyri at verkætlanin kann gerast veruleiki, er tørvur á, at kommunan játtar sín part av stuðlinum til verkætlanina, og tí hevur Húsarhaldsskúli Føroya sent kommununi umsókn um stuðul.

*Staðseting:*
Í áður samtyktu miðbýarætlan, er húsarhaldskúlin partur av miðbýnum.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 um húsarhaldsskúlar

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Alt eftir hvussu nógv fígging kann fáast inn aðrastaðni, í samband við partin hjá sjálvsognarstovninum, verður neyðugt hjá kommununi í fyrsta lagi at geva eina tilsøgn upp á 18,5 mió., sum tó kann gerast minni, alt eftir hvussu væl tað fer at ganga við at hjálpa stovninum at fáa fígging aðrar vegir.

Peningurin fellur ikki til gjaldingar, fyrr enn verkætlanin er liðug, og verður hetta tí í fyrsta lagi í 2017.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at fíggjarnevdin tekur støðu til stuðulin og beinir málið víðari til býráðið til endaliga støðutakan.

**FíN 15-03-2016:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 11. mars 2016, og at treytað tilsøgn verður send Húsarhaldsskúlanum.

**Býráðsins samtykt 17-03-2016**
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 15-03-2016.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**